## Á fundi í Klaksvík

Fyrradagin vóru Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, og umboð fyri mentamálaráðið í Klaksvík, har tey høvdu fund við mentanarnevndina og fíggjarnevndina hjá Klaksvíkar kommunu. Partarnir umrøddu ymisk viðurskifti á skúlaøkinum, eitt nú um greiðari býti millum land og kommunur á skúlaøkinum og um, at Norðoyggjar í framtíðini kanska verða eitt skúlaøki.

## Øssur í Danmark

Listamálarin Øssur Mohr úr Fuglafirði verður millum framsýnararnar á stóru framsýningini Art Herning, sum verður í Herning Kongrescenter frá 26. til 28. januar, har hann fer at sýna nakrar nýggjar málningar á básinum hjá Galleri Sct. Gertrud. Sjálvur skal Øssur sýna fram í gallarínum hjá Sct. Gertrud í Keypmannahavn frá 17. februar. Fernisering verður frá kl. 13 til 16, og tá fer Stanley Samuelsen at syngja og spæla.

# Sambandsflokkurin viðger støðuna hjá Alfred Olsen

**Hóast Kaj Leo Johannesen hevur sagt seg fingið vissu fyri, at Alfred Olsen fer at atkvøða við samgonguni, so sigur Alfred Olsen, at hann fer at atkvøða eftir síni sannføring. Sosialurin hevur í skjótt eina viku roynt at fingið eina viðmerking frá Alfredi Olsen, men enn hevur hetta ikki eydnast. Sambandsflokkurin er komin saman at viðgera málið**

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Kaj Leo: Alfred atkvøður við samgonguni*



*Alfred: Eg atkvøði eftir míni sannføring*

– Eg havi tryggjað mær, at hann stemmar við flokkinum og samgonguni.

So greið var útmeldingin hjá Kaj Leo Johannesen, formanni í Sambandsflokkinum, seinasta fríggjadag um Alfred Olsen, ið herfyri segði úr samgonguni eftir atkvøðugreiðsluna um §266b í revsilógini.

Útvarpið kann tó vísa á, at Alfred Olsen ikki treytaleyst vil stuðla samgonguni.

– Eg fari at atkvøða eftir míni sannføring, er Alfred Olsen endurgivin fyri at siga á heimasíðu Útvarpsins. Alfred Olsen avvísir ikki, at hann fer at atkvøða ímóti uppskotum, sum samgongan leggur fyri tingið.

Fyrr í vikuni kallaði advokaturin og fyrrverandi sambandstingmaðurin støðuna hjá Alfred Olsen eina andsøgn, og Jóannes Eidesgaard, løgmaður og samgonguleiðari, hevur sagt seg viljað havt ein fund um málið. Kristian Magnussen, formaður í tingbólki Javnaðarfloksins, hevur tó sagt, at Alfred Olsen ikki hevur meldað seg inn í andstøðuna.

**Breiða semjan?**

Alfred Olsen er framvegis formaður í Løgtingsins rættarnevnd, sum honum er tilutað sum samgongulimur, ið hann nú sigur ikki vera partur av.

Harafturat var Alfred Olsen maðurin, ið sum næstformaður í Sambandsflokkinum undirskrivaði samgonguskjalið, ið fekk heitið "Tann breiða semjan".

Spurningurin er nú, hvussu breið hendan semja er.

Sosialurin fekk fyrrapartin eitt stutt prát við Kaj Leo Johannesen, men einasta viðmerkingin hjá honum var, at tey sita í flokkinum og viðgera støðuna.

Sosialurin hevur eisini roynt hvønn yrkadag síðani seinasta frígggjadag at fingið eina viðmerking frá Alfred Olsen um støðu sína í Løgtinginum, men enn hevur hetta ikki eydnast.

# Føroysk gransking seint á kvøldi

**Alt tað føroyska granskingarumhvørvið verður umboðað í samstarvinum við Sjónvarpið, ið Fróðskaparsetrið samskipar í hesum døgum. Væntandi koma sendingarnar á skíggjan í seinnu helvt av februar**

VÍSINDI

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



Sosialurin skrivaði í gjár, at í hesum døgum tekur Kringvarp Føroya fyrilestrar upp í Nóatúni, sum skulu sendast í Sjónvarpinum.

– Sendingarnar verða helst sendar í seinnu helvt av februar. Tað verður helst send ein sending um vikuna, og tær halda fram til móti sumri. sigur Ivan Niclasen, programmleiðari í Sjónvarpinum. Hann greiðir frá, at hugskotið kom, tá Fróðskaparsetrið skipaði fyri fyrilestarrøðini "Setrið á Ferð" í fjør og fyrraárið, og at tey í Sjónvarpinum hildu, tað kundi verið áhugavert at gjørt sjónvarpssendingar burtur úr hesum.

Í fyrstuni var DK4 nýtt sum fyrimynd, men hetta menti seg til eitt gott og gevandi samstarv millum Kringvarpið og Setrið, greiðir Ivan Niclasen frá.

Tað er kortini ikki bara Fróðskaparsetur Føroya, ið stendur fyri tí vísindaliga partinum í hesi verkætlanini. Vísindaligir stovnar úr øllum granskingarunhvørvinum í Føroyum taka lut. Teirra millum kunnu nevnast stovnar sum t.d. Náttúrugripasavnið og Fiskirannsóknarstovan.

Ivan Niclasen, sigur, at sambært kringvarpslógini skal Kringvarpið skipa fyri upplýsing, og tað meta tey eisini, at tey gera framman undn avið t.d. tíðindasendingum og líknandi tilfari. Men nú kemur hetta afturat, uttan at tað gongur út yvir annað senditilfar hjá Sjónvarpinum, og um hetta eydnast væl, verður tiltakið tikið upp aftur seinni, sigur programmleiðarin.

**Viðkomandi evni**

Ivan Niclasen leggur dent á, at talan ikki er sokallað prime time-tilfar, tvs. sjónvarp ið ofta verður roknað sum sjónvarp við upplivingum og undirhaldi. Tí verða sendingarnar væntandi sendar seint á kvøði. Talan um tilfar, ið ofta verður kallað "smalar sendingar", hóast evnini eru breið og víðfevnd. Tó verður dentur lagdur á, at sendingarnar eru týdningarmiklar sendingar, har fleiri av Føroya fremstu granskarum oysa av síni vitan. Endamálið er sostatt at miðla vísindaligt tilfar, men hóast talan er um akademiskar fyrilestrar, er talan um evni, ið viðkoma okkum øllum, sigur Ivan Niclasen.

Í fyrstu syftu verða 21 fyrilestrar tiknir upp. Sjónvarpið hevur sett 3 upptøkutól av til endamálið, og tí er neyðugt at klippa í upptøkunum, og tí krevst eitt sindur av tí tøkniliga tilfeinginum, ið Sjónvarpið hevur til taks. Men fólkini frá teimum ymsu granskingarstovnunum hava sýnt vælvild, heldur Ivan Niclasen, og sipar til, at fleiri fyrilestrar verða uppitiknir um dagin.